# ALDUBÁRAN

POSTSMOGA 1074 FO-110 TÓRSHAVN

WWW.ALDUBARAN.COM


# Viðtøkur

1 Navn felagsins er Aldubáran og heimstaður tess er Tórshavn.
2 Endamál Aldubárunnar er at framføra nýggjari og eldri tónleik á listarligum høgum støði, við hesum stimbra ansin fyri tónlist og at menna tónlistaumhvørvið sum heild. Felagnum er tað ein serstøk skylda at bíleggja verk frá føroyskum tónaskaldum og at spæla føroyska tónlist í Føroyum og uttanlands.
3 Aldubáran verður skipað sum vanligt felag. Árligur fundur verður hildin seinast í juni ella fyrst í juli mánaði. Hesin fundur er hægsti myndugleiki felagsins.
4 Felagið velur sær eina arbeiðsnevnd. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, kassameistara og nevndarlimi/um. Ársfundurin kann eftir tørvi heita á fólk, ið ikki eru limir í felagnum, at hjálpa í nevndararbeiðinum. Hesi skulu ongantíð verða meira enn ein triðingur av arbeiðsnevndini.
Undirskrift formansins er bindandi fyri felagið. Nevndin verður vald einaferð um árið.
5 Nevndin hevur ábyrgd av, at verkætlanir eru lagdar í góðari tíð. Nevndin leggur og fremur hesar ætlanir í neyvum samstarvi við limirnar, og tær kunnu endurskoðast, um tørvur er á tí.
6 Nýggir limir kunnu verða tiknir á árligum fundi. Treytin er tó, at viðkomandi hevur víst tónlistarlig evni á hægsta støði, at viðkomandi hevur tikið lut í minst trimum verkætlanum saman við ljómliðnum, og at viðkomandi verður einmælt góðtikin sum nýggjur limur.
7 Um 2/3 av limunum krevja tað, verður felagið avtikið.
Verður felagið avtikið, verða ognir tess latnar Grunni Volker I. Berhrens til minnis.

Samtykt við broytingum á eykaársfundi 29.6.2001, á ársfundi 30.6.2006 og á ársfundi 2.7.2008.